# Forvitin av nátúr

**Tórun Ellingsgaard, sum er í Føroyum í hesum døgum í sambandi við Prix Føroyar finaluna, er júst byrjað í nýggjum starvi sum studiovertur hjá TV 2 á Bornholm**

SAMRØÐA
*Solby A. Eliasen*


*Tórun Ellingsgaard, sum verður vertur í Prix Føroyar finaluni leygarkvøldið, er júst byrjað sum studiovertur hjá TV 2 á Bornholm*

*Mynd: Jens K. Vang*

Hon hevur verið nógv úti um seg. Arbeiddi eitt styttri tíðarskeið á MTV, var við til at gera eina sendirøð hjá TV 2, sum eitur Matchmaker, skrivaði bók um Brixtofte og nú hevur hon júst sett seg í stólin sum studiovertur hjá nýggjheitunum hjá TV 2 á Bornholm.

Tað er sjálvandi føroysku Tórun Ellingsgaard talan er um.

Tórun sigur sjálv, at henni dámar avbera væl at arbeiða í fjølmiðlunum og hennara miðil er uttan iva sjónvarp.

– Eg eri forvitin av nátúr. Og seti eg meg inn í eitt hvørt, so vil eg altíð finna út av, hvussu ymisk viðurskifti hanga saman, greiðir hon frá. Eisini heldur hon yrkið vera so spennandi, tí tað er so fjølbroytt.

Hetta nýggja starvið inniber, at hon situr sum vertur tríggjar ferðir hvørt kvøld, og tað heldur hon fer at geva henni nógva rutinu við at sita frammanfyri upptøkutólið.

– Tað krevur nógva konsentratión at vera vertur, og ein skal royna at fáa søgurnar út á eina einklan og skilligan hátt, sigur Tórun, sum ikki heldur tað vera stórvegis trupult at vera vertur.

– Hetta fellur mær sum eitt arbeiði sum alt annað, sigur hon. Men hon ásannar tó, at hon enn hevur nógv læra, tí tað er ikki ein mánaður farin aftur um bak enn.

– Tað er nógv at seta seg inní, og eg havi ikki enn megnað at sett meg inn í øll viðurskiftini, men tað er helst bara spurningur um stutta tíð, so er tað komið upp á pláss, sigur nýggi verturin hjá TV 2 á Bornholm, sum varð liðug við sína útbúgving á Danmarks Journalisthøjskole í januar í fjør.

### Perfekt danskt

Tórun gongur sera høgt upp í, at tað hon hevur at bera sínum hyggjarum verður lagt fram á rættan hátt og við røttum málburði. Hon vil tosa perfekt danskt, og tískil gongur hon til talupedagog, har hon arbeiðir við at fáa alla ta føroysku dialektina burtur. Hon sigur, at tað skal ikki vera so, at tá hon er á skerminum, so sita hyggjararnir og hugsa meira um, hví hon tosar øðrvísi ella hvaðani hon man vera, enn at lurta eftir tí, sum verður sagt.

Tórun arbeiddi í SvF í tríggjar mánaðir í eini summarfrítíð, og har var hon millum annað eisini vertur í Degi og Viku.

– SvF leggur meira dent á politikkin enn menniskjasøgurnar, heldur Tórun, sum tó leggur aftur at, at tað ber illa til at samanlíkna, tí at Føroyar eru so lítið land.

Hon sigur, at hon fær nógvan íblástur av at arbeiða á Bornholm, har redaktørurin hjá henni er Ole Thisted. Sjónvarpsstøðin talan er um, er tann, har Árni Gregersen, sum fyrr var í SvF, er varastjóri. Tað eru nú skjótt seks ár, síðani Tórun Ellingsgaard flutti úr Føroyum. Tað var tá hon fór niður á journalistskúla. Henni hevur dámt sera væl niðri, og hon trívist framvegis.

– Eg veit ikki, um eg komi heimaftur. Eg havi tað avbera gott niðri nú, so í øllum førum verði eg verandi niðri í nærmastu framtíð, sigur Tórun Ellingsgaard, sum verður at síggja í øllum stovunum við sjónvarpi kring landið leygarkvøldið, tá finalan í Prix Føroyum fer av bakkastokki.

# Kvívíkingar krevja landpostrutu

**Í Kvívík eru fólk farin í holt við at savna undirskriftir, har tey biðja um at fáa eina landpostrutu, tí tað eru mong í økinum, sum ikki hava møguleika til at fara til Kollafjarðar**

POSTHÚS
*Solby A. Eliasen*



*Kvívíkingar og onnur fólk har í økinum savna nú undirskriftir saman, har tey biðja um at fáa eina landpostrutu*

Soffi Egholm úr Leynum hevur saman við einum áhugabólki tikið stig til at savna undirskriftir. Og tá Sosialurin tosaði við hana, vóru tey komin upp á 200 undirskriftir.

– Fólk her um leiðir eru sera hørm um støðuna og skilja ikki atburðin hjá Postverkinum, sigur Soffi, sum fer at handa løgmanni undirskriftirnar í morgin ella ovurmorgin.

Tey vóna at koma upp um 250 undirskriftir, og tað skuldi farið at eydnast teimum, tí enn er eitt øki eftir, har tey ikki hava verið.

Ein áhugabólkur er har í økinum, sum hevur tosað nógv um henda trupulleikan, sum nú hevur stungið seg upp. Men Soffi sigur, at tað nyttar onki at bara sita og tosa. Hon helt, at stundin var komin til at gera okkurt ítøkiligt við støðuna, og hon tók tískil stig til at savna undirskriftir inn.

Hon vísir á, at tað er serstakliga tvørligt hjá nógvum, sum ikki hava bil at sleppa til Kollafjarðar, tá tey hava ørindi á posthúsinum. Tí tað er ongin bussruta til Kollafjarðar. Tey noyðast til Havnar fyrst.

Soffi sigur at enda, at tað hevur skapt øsing millum fólk, tí tað hendir alt ov nógv upp á eingang nú. Sparikassin hevur avmarkað sínar avgreiðslutíðir til bara at vera hósdag frá klokkan 15 til 18, og nú er Posthúsið latið aftur.

Soffi sigur, at tey kunnu ikki góðtaka, at ein tænasta sum henda verður niðurløgd, og tey standa eftir við ongum.

– Tað minsta vit kunnu fáa ístaðin er ein landpostruta, heldur hon.



# Syrgiliga vanlukkan er ein gáta



*Húsini í Purkugerði brendu skjótt. Ein orsøk er helst, at gjøgnumtrekkur var, tí vindeygu og hurðar stóðu opin, so nógv luft slapp til, sigur løgreglan*

*Mynd Jens K. Vang*

**Tað er øllum ein gáta, hví ein 27 ára gomul mamma at trimum børnum valdi at fara innaftur í brennandi húsið týsmorgunin. Løgreglan kannar nú syndarliga eldsbrunan**

ELDSBRUNI
*Ingi Rasmussen*

Ein seks ára gomul genta og einir tvíburar blivu móðurleys, tá ein 27 ára gomul kvinna lat lív í eldsbrunanum í Havn týsmorgunin. Ein syrgilig vanlukka, sum rínur við allar føroyingar og hevur sett familjuna í sjokk.

Síðsta gerðin hjá kvinnuni var at bjarga lívunum í sínum trimum børnum. So skjótt hon varnaðist eldin, fekk hon børnini út úr húsunum.

Tað er framvegis løgregluni ein gáta, hví unga kvinnan fór inn aftur í húsið, sum stóð í ljósum loga, tí hon hevði fingið børnini út, og mamma og beiggi hennara, sum eisini vóru í húsunum, vóru eisini komin út.

Vit vita ikki, hví hon fór innaftur í køkin, sum varð hinumegin húsini. Hetta var ein avgerð, sum kostaði henni lívið, tí hon doyði óivað av roykeitranini, upplýsir Per Skov Christensen, kriminalpolitistur. Tað kann hugsast, at hon fór eftir onkrum luti, men tað eru bert gitingar.

Per Skov Christensen fær onki sagt um, hvussu eldurin kyknaði. Týsdagin var familjan alt ov skelkað til, at løgreglan fekk avhoyrt hana beinanvegin, men arbeitt verður við at finna fram til orsøkina til eldsbrunan. Føroyska løgreglan kannar sjálv málið.

Tað hevur ljóðað, at eldurin kyknaði í barnakamarinum, tí vitni sóu eld í vindeyganum, men tað er ikki staðfest enn, undirstrikar kriminalpolitisturin.

Eldurin breiddi seg óvanliga skjótt. Hóast sløkkiliðið var á staðnum fáar minuttir eftir, at fráboðanin kom um níggju tíðina týsmorgunin, sluppu brandmenninir ikki inn í húsið, har kvinnan lá.

Orsøkin til, at eldurin fekk so gott tak á húsúnum var helst, at gjøgnumtrekkur varð. Hurðin stóð opin og vindeygu vóru latin upp, so eldurin fekk góða nøring frá nógvu luftini. Í slíkum førum er best at lata vindeygu og hurðar aftur, so eldurin verður byrgdur inni. Húsini, sum standa í Purkugerði, vóru bygd í 1986. Sostatt høvdu tey ikki tær vandamiklu pláturnar, sum bresta í nógvum hita. Hinvegin vóru tey úr timbri og onkrir veggir vóru úr spønplátum, sum brenna væl.

# Javni fegnast um skúlatilboð

**Ein spíri, sum kann mennast. Soleiðis kallar Malena Arnoldsdóttir, forkvinna í Javna, skúlatilboðið til ung við breki, sum løgtingið einmælt hevur samtykt. Fríggjadagin skipar Javni fyri tiltaki, ið júst hevur framhaldsskúla til menningartarnað sum evni**

UNG VIÐ BREKI
*Ingi Rasmussen*

Forkvinnan í Javna er rættiliga glað í hesum døgum.

Fríggjadagin klokkan 19 verður almennur fundur á Landssjúkrahúsinum, sum Javni skipar fyri, har evni verður framhaldsskúli fyri ung menningartarnað. Og á fundinum kann hon bera tey boðini, at løgtingið samtykti einmælt týsdagin, við 30 atkvøðum fyri og ongari ímóti, at seta á stovn skúlatilboð fyri ung við breki.

– Eg eri rættiliga glað fyri, at hetta er komið ígjøgnum. Tørvurin er stórur kanst tú ætla, tí onki tilboð er áðrenn. Tey, sum eru normal, hava havt eina framhaldsskúla, men tey, sum eisini trongja virkuliga til at skúlast, hava onki havt. Tað hevur verið eitt paradoks, so hetta er eitt stórt framstig, sigur Malena Arnoldsdóttir.

Talan er um eina royndarskipan fyri ung við breki yvir 18 ár. Royndarskipanin er avmarkað til tvey 3 ára næmingaskeið, sum kunnu skipast á tveimum støðum í Føroyum. Skúla-, arbeiðs- og frítíðartilboðið verður til í mesta lagi 10 næmingar á hvørjum staði. Og tað er ikki nógv ímun til stóra tørvin. Men forkvinnan í Javna velur kortini at fegnast.

– Eg taki hetta sum eina byrjan, sum kann gerast til okkurt meira. Eg velji at gleðast um tað, sum kemur afturat, tí allur bati bøtur hjá okkum. Hetta er ein spíri, sum kann mennast til nakað meira, sigur Malena Arnoldsdóttir.

Á fundinum fríggjadagin verður framhaldsskúlin fyri menningartarnað sæddur úr ymiskum sjónarhornum. Á fundinum vera Høgni Hoydal, landsstýrismaður, Katrin Dahl Jakobsen úr Javnaðarflokkinum, Jógvan á Lakjuni úr Fólkaflokkinum, Elinora Reinert, foreldraumboð, Hans Eli Dahl av Sernámsskúlanum, og Rodmund Nielsen, borgarstjóri í Runavík, sum verður orðstýrari.

– Vit vóna, at fólk møta væl upp, tí hetta er eitt týdningarmikið evni fyri okkara ungu menningartarnaðu. Fólk eru vælkomin at koma við viðmerkingum og spurningum, so vit fáa lýst evnið so væl sum gjørligt, sigur Malena Arnoldsdóttir.

## Tjóðpallurin grønt ljós

**Politikararnir hava givið Tjóðpalli Føroya grønt ljós. Eitt leiklistaráð skal veljast, sum skal seta stjóran. Stjórin setir leikarar og dansarar í starv og skal leggja skránna**

LEIKLIST
*Ingi Rasmussen*

Løgtingið hevur givið sína heimild til at seta á stovn Tjoðpall Føroya sum sjálvstøðugan almennan stovn.

Tað hendi týsdagin, tá 27 løgtingsmenn trýstu á grøna knøttin og harvið tóku undir við Tjóðpallinum. Bara Gerhard Lognberg atkvøddi blankt og Jenis av Rana atkvøddi ímóti.

Sambært uppskotinum skal eitt leiklistaráð setast við umboðum fyri Leikarafelag Føroya, Meginfelag áhugaleikara Føroya, Listafólkasamband Føroya, Tórshavnar Býráð, starvsfólk og landsstýri.

Leiklistaráðið setir stjóran, sum verður áramálssettur. Stjórin skipar fyri virksemi stovnsins. Hann skal gera ein skipanarligan bygnað fyri stovnin og setir í starv og loysir úr starvi leikarar og onnur starvsfólk. Hann hevur listarligu ábyrgdina og er evsti myndugleikin í spurninginum um leikskrá. Stjórin ger eisini uppskot um fíggjarætlan, sum skal leggjast fyri landsstýrismannin.

Hjá Tjóðpalli Føroya fara sjónleikarar, dansarar og onnur leikhússtarvsfólk at starvast. Tjóðpallurin skal í sínum virksemi leggja dent á føroysk verk á dygdargóðum listaligum støði og skal framføra bæði klassisk og nútímans verk.

Enn eru ongir pengar játtaðir til Tjóðpall Føroya. Heldur ikki er ætlanin, at eitt tjóðleikhús verður bygt beinanvegin, men miðast skal eftir, at eini hús verða funnin til endamálið í høvuðsstaðnum.